# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sambandið - status

Magni Laksfoss ger í dag í kronikk status yvir hugsjónarligu støðuna í føroyskum politikki. Greinin avdúkar ta ideologisku mynd, sum eitt nýtt ættarlið í Sambandsflokkinum hevur av føroyskum politikki. Leisturin og politiska visjónin minna ikki sørt um Fogh og hansara leið ígjøgnum danskan politikk – fyrst erkaliberalistur, so sosialliberalur. Magni Laksafoss leggur út við at staðfesta, at vit hava tvær politiskar hugsjónir í Føroyum nevniliga eina framsókna sosial liberala sambandshugsjón og so eina afturhaldssinnaða misskilta nationalismu, sum eyðkennir hinar flokkarnar. Sambandshugsjónin er sosialliberal mótvegis tí misskiltu nationalismuni, har m.a. staturin er eitt mál í sjálvum sær, har frælsi og møguleikar hjá tí einstaka hava lítlan og ongan týdning. Laksafoss er sostatt úti í somu ørindum sum formaður bróðurfloksins í Danmark, nevniliga at skapa eina vit og hini mynd. We are the good guys – you are the bad guys.

So mikið um yvirskipaðu ideologisku útmeldingina. Restin av greinini er ikki minni áhugaverd. Vit fáa at vita, at sambandsflokkurin er sosialliberalur flokkur men við høvðusdentinum á liberalismuna. Hetta er veruliga nýggir tónar, al tann tíð flokkurin vanliga hevur lýst seg sum ein liberalistiskan flokk og liberalisma og sosialliberalisma eru jú sum dagur og nátt. Høvundin reksar so upp øll tey vælsignilsi, ið standast av liberalismuni: Liberalisman hevur m.a. stríðst fyri frælsinum at seta búgv, at ríva niður tollmúrar, ið hava sett avmarkingar fyri, at vinnulívið og tann einstaki kann mennast frítt. Hetta stríð er heldur ikki av í dag, sjálvt um flestu lond í Evropu hava sæð ljósið og hava valt at taka seg saman í felagsskapin ES, sum er ein felagsskapur við somu sosial liberalu sjónarmiðum, sum Sambandsflokkurin stendur fyri (cit.). Her eru ørindi høvundans greið: ES limaskapur er ein logisk fylgja av liberalum hugmyndastøði. Áhugaverd lýsing av liberalu ideologiini, men kortini kenst, sum her manglar okkurt í myndini? Kann tað vera feskasta heimsfevnandi og oyðileggjandi fíggjar- og búskaparkreppan, sum stavar frá tí neoliberala politikki, sum hevur eyðkent flestu framkomnu lond seinastu mongu árin?

At enda spyr Magni Laksafoss, um tað ber til at sameina stríðið fyri persónliga frælsinum hjá tí einstaka við tankasettið hjá tí misskiltu nationalismuni, ið sum skilst er umboðað av øllum hinum flokkunum í føroyska politiska spektrinum. Magni svarar nei, og grundgevingarnar kann lesarin finna í sera áhugaverdu kronikkini. Samantikið ein áhugaverd grein, ið vit mæla øllum til at lesa, men neyvan ein grein, ið er egnað at vinna undirtøku fyri einum nærri tilknýti til ES ella fyri tann skuld at vinna breiða undirtøku fyri neosambandinum. Hetta at avmynda politikk, sum nakað, ið snýr seg um okkum og hini skapar vanliga spjaðing og spjaðing er valla tað Føroyar og føroyingar hava mest brúk fyri í løtuni.

**Sosialurin**

# Sambandsflokkurin tekur ábyrgd - meðan Javnaðarflokkurin vaskar sínar hendur

NIELS NATTESTAD



**Vónandi er tað ikki soleiðis, at ein Javnaðarflokkur í kreppu vil sleppa sær úr ABC-samgonguni og loyva Tjóðveldi framat landsins leiðslu, nú boðfretur floksins reingir veruleikan, meðan politiski framsøgumaðurin spinnur av lívsins kreftum**

Skelkaður av seinastu Gallup-kanningini, sum vísir, at veljarin revsar Javnaðarflokkin, sum í meira enn 4 ár sat við landsins leiðslu og við almanna- og heilsumálum, roynir Sofus D. Johannesen, boðfretur og fyrrv. valevni floksins í fjølmiðlunum at hunddálka landsstýriskvinnuna í almannamálum og Sambandsflokkin sum heild.

Til stóran skaða fyri samgonguna og harvið stabilitetin í samfelagnum, lekur politiski talsmaður Javnaðarfloksins, John Johannesen, við jøvnum millumbilum misvísandi tíðindi út til fjølmiðlarnar.

At veljarin gjøgnumskoðar hendan glantrileik, er eingin ivi um. Hóast tað, skulu uppáhaldini hjá Sofus D. Johannesen og spinnið hjá John Johannesen, ikki standa ósvarað.

**Fólkapensionistarnir og fyritíðarpensiónirnar**
Veruleikin er tann, at fíggjarmálaráðharrin, Jóannes Eidesgaard, og **allir** tingmenn Javnaðarfloksins tóku undir við - og atkvøddu fyri at tálma rakstrarútreiðslunum á almannaøkinum, tá ið árliga hækkingin av pensiónsviðbótunum stutt fyri árskiftið varð lækkað úr 4% niður í 3% So ikki kann sigast annað enn, at Sofus D. Johannesen fer lættliga um sannleikan, ja, skjýtur beinleiðis við síðuna av, tá ið hann roynir at geva landsstýriskvinnuni í almannamálum skyldina.

**Dagtilhaldini**
Tá ið stuðulin til dagtilhaldini varð tikin av, og fíggingin latin upp í hendurnar á kommununum, sum eiga málsøkið, var eisini fíggjarmálaráðharrin við til at góðtaka sparingina, eins og **allir** tingmenn Javnaðarfloksins atkvøddu fyri at avtaka stuðulin, sum latin hevur verið dagtilhaldum í nøkur ár. Eisini her skjýtur Sofus D. Johannesen við síðuna av.

**Eldraøkið**
Rætt er tað sum Sofus D. Johannesen sigur, at talið á ellis- og røktarheimsplássum árini 2004 – 2008 varð økt munandi. Men tað var ikki Javnaðarflokkinum fyri at takka! Tað vóru kommununurnar kring landið, burtursæð frá javnaðarstýrdu høvuðsstaðarkommununi, sum fyrst og fremst tóku sær av hesari uppgávuni.

Heldur enn at leggja eftir Rósu, átti Sofus at takka henni fyri at hækka stuðulin til bygging av røktarplássum. Tað gjørdi hon júst fyri at fáa Havnar kommunu at fara í gongd. Og tað tykist sum hevur tað eydnast.

**John Johannesen og eykajáttanin til almannaøkið**
Hóast John Johannesen spinnur í fjølmiðlunum og sigur seg hava megnað at flyta pening frá íløgum í undirstøðukervið kring landið til rakstur, er neyðugt at vísa hesum spinni aftur.

Tørvur er framvegis á at finna einar 25 mió. kr. til almannaøkið. Tað verður stóra avbjóðingin hjá samgonguni og ikki minst hjá fíggjarmálaráðharranum komandi dagarnar. Tí kann sigast, at higartil hevur Javnaðarflokkurin bert spunnið og vaskað sínar hendur, uttan vilja til at finna neyðuga peningin til almannaøkið!!

**Sofus gevur Hans Paula veingir**
Veruligi fíggjartørvurin til eldrarøkt er nú munandi hægri, enn almannaráðið hevur skrásett. Talan er um nógvar mió. kr., sum landsstýriskvinnan í almannamálum nú má biðja um eykajáttan til. Mong undrast á, hví skrásetingin er so misvísandi!!

Tá ið málið um sonevnda "Lítla Petur" var frammi í fjølmiðlunum, upprættaði Hans Pauli Strøm ein stovn í Havn og setti fólk í starv, hóast tørvurin var ikki til staðar, og stovnurin tí ongantíð varð tikin í nýtslu. Hvussu nógvar milliónir hetta mistak hevur kostað føroyska skattgjaldaranum, er enn ikki komið fyri dagsins ljós.

Fyri stuttum varð avdúkað í fjølmiðlunum, at 5 mió. kr. higartil eru nýttar til keyp og umbygging av einum húsum í Klaksvík, og at tørvur harafturat er á uml. 5 mió. kr. fyri at gera húsini líðug til endamálið, tey vórðu keypt til. Hvat hetta ævintýr Hans Paula Strøms kemur at kosta skattgjaldarunum, er ikki komið alment fram enn.

Kortini mugu vit ásanna, at Hans Pauli Strøm fekk ikki einki á skaftið saman við m.ø Sambandsflokkinum í fyrru ABC-samgonguni, men tá ið Sofus D. Johannesen ger hann til tann reina eingil og Rósu Samuelsen til tað øvugta, so er neyðugt at gera vart við, at tað var Hans Pauli, sum umsat málsøkið, sum Rósa **júst** hevur yvirtikið!

**Stór uppgáva**
Eingin okkara misunnir landsstýriskvinnuni í almannamálum, sum hevur fingið eina sera tunga uppgávu at loysa. Serstakliga nú fíggjarstøðan er, sum hon er, og tørvurin á eldraøkinum og øðrum økjum við, veksur í hvørjum. At tað verður neyðugt, at øll samgongan – **eisini Javnaðarflokkurin** – tekur lut í trupla arbeiðnum, átti at verið sjálvsagt.

Tí er tað út av lagi vánaligt, at boðfretar og spinnarar vaska sínar hendur og royna at skúgva ábyrgdina yvir á landsstýriskvinnuna í almannamálum, sum fyri bert fáum mánaðum síðani tók á seg almannaøkið, sum ein javnaðarmaður hevði røkt í meira enn 4 ár.

Rósa Samuelsen hevur síðan tá gjørt eitt megnar arbeiði fyri at royna at fáa tað at bera til við avmarkaðum tilfeingi!

Valúrslitið hjá Javnaðarflokkinum til seinasta løgtingsval, tá ið flokkurin misti eitt løgtingsumboð, og nýggjasta Gallup-kanningin, har ið flokkurin missir enn eitt umboð á tingi, eru kanska orsøkin til, at bæði Sofus og John eru so ovurhonds virknir í fjølmiðlunum.Men flokkurin átti at verið so mikið at sær komin, at hann ístaðin tók í egnan barm og royndi at bøta um støðuna heldur enn at blaka runu eftir samgongufeløgunum!

Tað er neyðugt sum kanska ongantíð áður hjá verandi samgongu at standa saman og draga eina línu. Tað átti heldur ikki at verið so trupult!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.